# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Russland fer at tryggja allar avgerðir, sum fólkið í Suðurossetia og Abkhasia ella Kaukasus taka*

*Dmitrij Medvedev, forseti*

# Færri flyta um Oyrasund



**Talið á teimum, sum flyta úr Danmark yvir um Oyrasund til Svøríkis, er minkað nógv tað seinasta árið**

Fyrra hálvár fluttu 556 fleiri eystur um Oyrasund enn hinvegin, og tað er nógv minni enn í sama tíðarskeiði í fjør, tá 1.209 fleiri fluttu úr Danmark til Skåne enn hinvegin. Gongdin er tann sama, um hugt verður at, hvussu nógvir danir flyta til Malmø. Fyrra hálvár í ár var talið 325 ímóti 801 somu mánaður í 2007, sigur danska hagstovan.

Hildið verður, at tað er prísgongdin á íbúðar- og húsamarknaðinum í Keypmannahavn og Skåne, sum er orsøkin. Prísurin fellur báðumegin Oyrasund, men kortini væl skjótari donsku megin sundið enn eystanfyri.

*Tøl hjá donsku og svensku hagstovunum vísa, at síðani fasta sambandið kom um Oyrasund í 2000, eru meiri enn 17.200 danir fluttir til Skåne*

# USA og Libya samd um endurgjald fyri bumbur

**Nú USA og Libya eru vorðin samd um endurgjald fyri bumbuatsóknir, fara londini ætlandi at knýta tað diplomatiska sambandið aftur**

Í gjár skrivaði amerikanskir og libyskir myndugleikar undir eina semju um endurgjald fyri tær libysku bumbuatsóknirnar at amerikonskum málum og amerikonsku atsóknini at málum í Libya í 1986.

Tann best kenda atsóknin er bumbuspreingingin í einum amerikonskum flogfari uppi yvir skotska býnum Lockerbie í 1988, og umframt hana hevur Libya játtað at rinda endurgjald í sambandi við eina atsókn at einum diskoteki í Berlin í 1986. Afturfyri hava amerikanarar játtað at rinda endurgjald fyri loftálopini á býirnar Tripoli og Benghazi í 1986.

Samráðingarnar millum londini hava verið sera drúgvar, og nú tær eru lidnar, hevur George W. Bush, forseti, boðað libyska leiðaranum, Muhammar Gaddafi, frá, at USA vónar, at viðurskiftini millum londini bæði fara at batna.



*Libyski leiðarin Muhammar Gaddafi*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Semja um rakettverju

Amerikanskir og polskir embætismenn hava í dag skrivað undir eitt skjal, sum sigur, at tey bæði londini eru samd um, at USA skal sleppa at seta ein part av sínari rakettverjuskipan á polska jørð. Afturfyri hava amerikanarar boðið Póllandi eitt ávíst samstarv á hernaðarøkinum. Tað siga keldur, sum standa polska forsetanum, Donald Tusk, nær. Eitt nú vilja keldurnar vera við, at sambært avtaluni hevur USA játtað at koma Póllandi til hjálpar hernaðarliga, um landið verður álopið.

USA ætlar at seta partar av teirri umstríddu rakettverjuskipanini upp í Póllandi. USA sigur, at verjuksipanin hevur til endamáls at forða rakettálopum úr fíggindalondum so sum Iran og Norðurkorea. Russland er hart ímóti amerikonsku ætlanini og hevur hótt við at venda sínum álopsrakettum ímóti Vesturheiminum, um amerikanska ætlanin verður framd í verki.



*Donald Tusk er polskur forseti*

*Mynd: AP*

### Kvinna og tvey børn myrd í Oslo

Norska løgreglan boðaði í gjár frá, at ein kvinna og tvey børn vóru funnin myrd í einum húsum í býarpartinum Grefsen í Oslo. Løgreglan varð boðsend seinnapartin, tí onkur hevði boðað frám húsaófriði, og tá løgreglan kom á staðið, fann hon tvey deyð børn og eina illa særda kvinnu. Hon varð alt fyri eitt flutt á sjúkrahús, men doyði løtu seinni, skrivar NTB.

Løgreglan í Oslo segði í gjárkvøldið, at hon hevði tikið ein mann, sum var undir illgruna fyri at hava myrt kvinnuna og tey bæði børnini, men løgreglan dugdi ikki at siga, hví tey trý blivu myrd.

Fólk í grannalagnum í Grefsen hava sagt fjølmiðlunum, at tey myrdu vóru av útlendskum uppruna, men at tey hava ongantíð havt nakrar trupulleikar av teimum.